LM-099/2023

Fylgiskjal 43

Hoyringsskriv til uppskotið um løtingslóg um burðardygga ferðavinnu, Ferðavinnulógin.

Sandavágur 22.2.2024

Vegna eigaranar í Dalhaga í Sandavági vil hagastýrið koma við hesum viðmerkingum.

Fyrst vilja vit geva tykkum rós fyri at verða komin við einum ítøkiligum uppskotið, so ein hevur okkurt at fyrihalda seg til og tosa út frá.

Øll uppskot muga sjálvandi snikkast til eftirfylgjandi og rættast soleiðis at flest øll í verða beinleiðis ávirkaði av lógini, kunna taka undir við lógini.

Vit í Dalhaga vilja hava rætt til at vísa á hvar ein kann ganga í haganum soleiðis, at ein sum ferðandi órógvar hagan og tað lív í har er sum minst. Vit vilja eisini hava rætt til at steingja Dalhaga, tá vit meta tað verða best fyri trygdina hjá teimum ferðandi ella hjá Dalhaga. Tað kann t.d. verða tá haruskjóting er, undir lembing, tá brundtíð er og tá vit fara á fjall.

Vit í Dalhaga vilja hava loyvt til at vísa á hvar fremandafólk kunna ganga í haganum, hettar við at seta prestar ið vøllin, ið vísa hvar ein skal ganga í haganum og hvat fyri torleikastig rutan er. Fyri hesa tænastu vilja vit hava rætt til at uppkrevja eitt ferðagjald frá fremandafólki, ið fara í Dalhaga at ganga. Dalhaga eigur sjálvandi rætt til eina samsýning, um tað verður skipa fyri gongutúrum í Dalhaga av onkrum ið fær eina samsýning fyri at skipa fyri slíkum túrum. Eisini vilja vit hava rætt til at sýta fyri at onnur reka vinnu í Dalhaga, um vit meta tað er tað besta fyri Dalhaga. T.d. um ikki semja fæst við ein ið vil bjóða túrar í Dalhaga.

Røktarar ella hagastýrið má altíð hava rætt til at gera ábøtur á hegn og frágarðar í haganum. Hettar uttan at spyrja Landsstýrið um loyvi til tað. Slíkt arbeiði verður gjórt eftir hvat er best fyri djórahaldið og røktina av haganum. Eisini eigur ognarhagin, um ognarnir eru samdir um tað, at gera annað í haganum, enn at hava seyðahald.

v/hagastýrið í Dalhaga

Pætur Niclasen

Fía Selma Nielsen

Emil Hentze